DAGSINS MEINING

Breiða semjan

Tey flestu vilja sjálvstøðu fyri føroysku tjóðina. Tey flestu ynskja ivaleyst, at føroyingar einsamallir hava avgerðarrætt í øllum føroyskum viðurskiftum. Semja er bara ikki um tíðarkarm og form. Tað er tí umráðandi, at ætlaða stórbroytingin av viðurskiftum okkara við kongaríkið Danmark verður framd á breiðum politiskum grundarlag. Vit hava áður víst á hetta. Vit hava sagt, at tað formliga er í lagi at fremja fullveldið við smalast hugsandi meiriluta. Men vit hava samstundis gjørt vart við, at hetta, sum frálíður fer at gera eina gjógv í fólkinum. Heldur eiga Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin at taka upp ein dialog við Javnaðarflokkin, ið eins og Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hevur flutt seg nógv í fullveldismálinum.

Seinasta útspælið frá Javnaðarflokkinum svarar til tað, sum longu er vrakað av dønum, siga samgonguumboð. Tað er mikið møguligt, og tað kann so bara aftur merkja, at eingin grundleggjandi ósemja longur er í áskoðan á málið fyri sjálvstýrispolitikkinum. Ósemjurnar mugu sostatt vera um onnur viðurskifti t.d. um búskaparpolitikkin, serstakliga um privatiseringarnar og skattapolitikkin og um almanna- og heilsupolitikkin. Eisini kann tað hugsast, at stóru flokkarnir hava ymsar áskoðanir á ferð og tíðarkarmar í sjálvstøðistilgongdini.

Vit hava áður í hesum teigi nomið við spurningin um breiðu tjóðskaparligu semjuna. Vit hava víst á grundlógarnevndina, sum tað forum, har stórar tjóðskaparligar ósemjur kunnu verða loystar. Vit hava eisini ferð eftir ferð mint á, at løgmaður í síni Ólavsøkurøðu í ár sóknaðist eftir breiðum semjum um tjóðskaparspurningin og um aðar spurningar við. Nú hava allir ikki bert løgmaður eitt einastandandi høvi at finna eina leið í felag fram ímóti eini tjóðskaparligari semju um sjálvstøðu Føroya. Her eru nógv øki, ið semja kundi verið um. Nevnast kann tann stóra yvirtøkulógin, sum skal koma, sum eitt úrslit av Tvøroyaraskjalinum hjá løgmanni og forsætismálaráðharranum. Er hetta ikki eitt upplagt høvi at bjóða eitt nú Javnaðarflokkinum við at loysa hetta kanska tað størsta málið, síðan 1948?

Eitt annað stórmál, ið kann verða nevnt, er uttanríkis- og trygdarpolitikkurin. Her eigur avgjørt at vera funnið fram til eina breiða semju um støðu Føroya í NATO-høpi, um støðu Føroya til ES eins væl og til støðu okkara í altjóðasamfelagnum sum heild. Hesir eru so stórir spurningar, at samgongan kann heilt einfalt ikki loyva sær at taka avgerðirnar á smalast hugsandi støði. Somuleiðis má andstøðan og serstakliga Javnaðarflokkurin hava greið alternativ og greiðar politiskar útmeldingar um hesar spurningar – nakrir av teimum størstu í nýggjari tíð í Føroyum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

»Tey reinu – tey røttu – tey rættvísu«

Jóannes Eidesgard

Øll minnast vit søguna um hin skriftlærda, sum í bøn síni í halgidóminum takkaði Guði fyri, at hann ikki var sum tollarin, sum stóð skamt frá og í sínum lagi eisini bað. Og eins væl kenna vit hesi fólkini, sum halda seg vera eitt vet betur enn vit onnur. Tað eru tey, sum eru tey seriøsu, tað eru tey, sum siga sannleikan, og tað eru tey, sum eru tey røttu. Og so hava tey okkum øll onnur til at styrkja teirra egna ego við. Vit minna tey á, hvussu framúrskarandi tey eru.

Hendingin henda dagin í løgtinginum, har Høgni Hoydal tekur bæði tingfólk og formansskap í skúla um borðbart orðaval, fær meg at hugsa um ein gamlan Western-film við heitinum "The Good, the Bad and the Ugly." Uttan at hava fingið leiklutin tillutaðan, so hevur Høgni Hoydal sjálvur átikið sær leiklutin sum tann góði, tann reiðiligi, tann sakligi, tann hampuligi og sum tann einasti av mongum, sum altíð er seriøsur. Apropos film, so hevur sami Høgni Hoydal enntá stuðla Ulla Boye Rasmussen við 200.000 kr. av skattgjaldarans pengum fyri júst at tekna hesa somu myndina av sær sjálvum.

Formansskapurin í løgtinginum hevur so gjørt eina niðurstøðu, og vit vanligu tingfólk kunnu ikki annað, enn taka hana til eftirtektar. Sjálvandi skulu vit seta mørk fyri, hvat man kann loyva sær at siga á tingi, men tað kundi kanska verið gjørt við, at allir flokkar luttóku í tí viðgerðini, heldur enn at Høgni Hoydal skal seta mørkini.

Ikki tí, Høgni Hoydal er í orðavali og framburði vanliga sera hampuligur, men sum útbúgvin í fjølmiðlafakinum, so veit hann betur enn onnur, hvussu boðskapurin best kemur fram. Men hann veit sanniliga eisini, hvussu rætti boðskapurin ikki skal koma fram.

Hugsið bert um, hvussu væl hann dugur at seta dagsskránna soleiðis, at veruligi málini, sum koma okkum øllum við, glíða afturum.

Tá hann nú hevur átikið sær leiklutin sum The Good, so kunnu vit spyrja, hvar hansara egnu mørk eru - ella hvar eru mørkini hjá tí flokki, hann er formaður fyri? Lat okkum taka nøkur dømi:

- Tjóðveldisflokkurin skírdi meg fyri hálvan føroying, og Lisbeth L. Petersen fyri hálvan dana, meðan Høgni Hoydal var einasti rætti føroyingurin. Hvat minnir slíkt okkum um? Hvør brúkti júst somu terminologi um ta reinu rasuna?
- Fólkatingsvaldagin stóð Høgni Hoydal fram við mynd av sær sjálvum í bløðunum og segði, at oljan var funnin. Hvat er slíkt, er tað reiðiligt - umboðaði hann sannleikan - var hann seriøsur? Høgni Hoydal er so einasti føroyingur, sum higartil hevur fingið nakað persónligt burturúr oljuni. Hann bleiv jú partvís valdur við hjálp av hesi lygnini.
- Hvat við tí skoðsmáli, Høgni Hoydal hevur givið andstøðuni frá tingsins røðarapalli? Hann sigur, vit eru tey, sum standa fyri ábyrgdaloysinum - vit vilja reka landið aftur í kreppu - vit høvdu ábyrgdina av 80´unum. Er slíkt reiðilig tala. Er hetta styrkjandi fyri fólkaræðið?
- Hvat við, tá eg av formanni í tingbólki Tjóðveldisfloksins á tingsins røðarapalli eri lagdur undir at vera landasvíkjari. Revsingin hjá landasvíkjarum er at missa lívið. Er slíkt reiðiligt?
- Hvat við, tá aðrir tjóðveldismenn hava skírt meg fyri at vera ein quisling og ein, sum móttekur blóðpengar úr Danmark (hetta seinna eisini av tingsins røðartapalli). Er slíkt reiðiligt?

Ikki tí, ivaleyst hava eisini javnaðarfólk í onkrum hørðum orðadrátti brúkt orð og myndir, sum kanska liggja á markinum, men hví í Guðs garði Høgni Hoydal skal átaka sær leilutin sum tann einasti, sum dugur sær hógv, ja tað skilji eg bara ikki. Tað kann so bert skyldast eini ótrúligari trongd eftir at royna at geva fólki eina aðra mynd enn ta røttu.

Vit mugu enn einaferð staðfesta, at lætt er at sígga flísina í eyganum á bróðrinum, tó uttan at man fær eygað á bjálkan í egnum eyga.

Skaldsøgukapping

KAPKING
Listastevna Føroya

Listastevna Føroya bjóðar við hesum til kapping at skriva nýggja, føroyska skaldsøgu. Handritið skal ikki hava verið almannakunngjørt áður. Skaldsøguhandritini skulu verða latin Listastevnu Føroya í seinasta lagi 1. mai 2004.

Ein dómsnevnd metir um tey innkomnu handritini. Í dómsnevndini sita Katrin Næs, studentaskúlalærari, Turið Kjølbro, cand.phil í norðurlendskum bókmentum og Bergur Hansen, mag.art í norðurlendskum bókmentum. Dómsnevndin skilar sær rætt til onga virðisløn at lata.

Umftramt at lúka oman fyri nevndu treytir, skulu handritini verða í minsta lagi 75 A-4 síður til støddar, tey skulu vera skrivað soleiðis, at frástøðan ímillum reglurnar er 1.5, og tey skulu latast Listastevnu Føroya í einari pappírsútgávu og einari teldutøkari útgávu.

Handritini skulu verða send á tann hátt, at inni í brævbjálvanum, sum handritið verður sent í, verður lagdu ein afturlatin brævbjálvi við navninum á skaldsøguni og á henni ella honum, sum skrivað hevur.

Í virðisløn verða latnar kr.150.000,- fyri besta handritið.

Vinnarin verður kunngjørdur, tá Listastevnan 2004 verður sett hin 6. august 2004. Listastevnan verður hildin kring landið í døgunum 6. til 15. august 2004.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tið.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Barnapengar

Gunnar K Nattestad

Nú aftur uppskot liggur á borðið um at studul til barnapengar skal falla burtur, eru tað fleiri sum tala um hvussu hart tad rakar teyið skula gjalda (ikki gjalda alt sum er). Fellur endurgjaldið burtur, økjast byrðarnar hjá hesum og tí má skipanin halda fram.

Tað er einki nýtt í at eingin er glaður fyri at missa endurgjald, men tad sum er nógv meira viðkomandi at snakka um er, um endurgjaldið nakrantíð skuldi verið komið?

Tað er ein stórur sorgarleikur at foreldur skiljast /fara frá hvørjum øðrum, ikki minst fyri børnini. Tað kann ikki gerast upp í pengum, hvussu nógv verður brotið bæði so og so. At tann sum ikki hevur børnini skal gjalda man vera ein av teimum minnu plágunum, men - hvat guldu tey áðrenn ella hvat gjalda tey sum eru gift/liva saman fyri síni børn?

Um tað sakliga mett kostar uml. 1622 kr. um mánaðan at forsyrgja einum barni, so er tað væl ein útreiðdsla sum tveyið eru saman eisini hava. Hvussu ber tað so til at tað knappliga er so synd í teimum, sum skula gjalda til hitt foreldurið þ passar børnini?

At pápar (ella mammur) skula gjalda 881 kr. um mánaðin fyri at hava sett eitt barn í verðina ljóðar ikki nógv. Enn minni sýnist tað um vit rokna um og staðfesta at tað verður til 27 kr. um dagin fyri hvørt barnið.

At fara hvør til sítt frítekur ein ikki frá foreldra heitinum ella forsyrgjara skylduni, men allíkavæl hevur tað almenn endurgoldið helvtina av barnapengunum; man sleppur sostætt dupult so bíliga við ikki at hava børnini.

Tað at endurgjaldið einaferð er komið, eigur ikki at vera nøkur rættvísgerð fyri at tað eisini skal halda fram. Tað er hinvegin uppá tíðina at fáa endurgjaldið vekk, so at tað ikki verður gjørdur munur á ábyrgd foreldranna, hvørjum umstøðum tey so hava valt at liva undir.

Tað er fyrst og fremst foreldranna uppgáva at taka sær av sínum børnum við øllum skyldum sum fylgja við - tað almenna hvørki skal ella kann stíga inn og átaka sær hesa uppgávu.

Tunnilin Hov/Øravík

Johan Dahl
Løgtingsmaður

Alneyðugt at skjøtil verður settur á í komandi árið - 7 mió avsettar á fíggjarlógini fyri 2004, er ein upphædd sum ikki kann takast í álvara.

Í dag hoyrdu vit at tilboðini uppá Norðoyatunnilin blivu upplatin , - ein sera góð og neyðug loysn fyri alt infrakervið sum bindur Føroyar saman og lættur um hjá øllum norðoyingum, - privatum sum vinnuni, ein loysn sum kemur at broyta norðoyggjar og gera lívið lættari fyri tey sum búgva har.

Tunnilin Hov - Øravík sum hevur verið politiskt forhálaður at fara undir nú í longri tíð, er eins alneyður at fáa byrjan uppá fyri suðringar, - ongantíð ov skjótt í komandi árið og vóni eg at útbjóðingin av hesum arbeiði, verður framd beinanvegin forkanningarnar eru lidnar av nýggju, niðaru linjuføringini.

Sum skilst so er tilfarið sum kannað er gott nokk til at tunnilin kann gerast eftir hesum uppskotinum.

Samgongan hevur í fíggjarlógaruppskotinum sett eina upphædd uppá **7 mio** av til at byrja hetta arbeiði og kann tað ikki sigast at verða annað enn láturlig upphædd, - sum sigur okkum, at tað als verður fari undir nakra boring í komandi árið, men kanska nakað av vegagerð til og frá tunnlinum.

Tað ber ikki til at málið verður forhálað, tí sum øll vita so er vegastrekkið um hovseggina av vandamiklastu í landinum og havandi í hugað at tung ferðsla við trailarum o.ø. fer framm her nátt sum dag, er bert ein spurningur um tíð nær vanlukkan hendir.

Øll sum nýta hesa farleið vita eisini, at hetta vegastrekki ikki er tespuligt at koyra í stormið og á vetri,- tað er beinleiðis lívshættisligt

Heitt verður tí á landsstýrismannin í vinnumálum, og á **einasta samgongulimin** í Suðuroy, um at fáa sett eina upphædd á fíggjarlógina fyri 2004 sum munar nakað og arbeiði veruliga við kraft fer í gongd næsta ár.

Teistin

Opin spurningur til Bjarna Djurholm, landsstýrismann

Alfred Olsen

At ein meira ella minni álvarsamur tekniskur feilur er gjørdur í sambandi við byggingina av strandfaraskipinum "Teistanum", kann eingin longur vera í iva um. Skipið, sum er nýtt, lá inni á Skála í fýra mánaðar í summar, og minni enn tveir mánaðar eftir, at tað aftur er farið í sigling, eru enn einaferð boð eftir einum avloysaraskipi, tí Teistin hevur tekniskt brek.

Eg havi fyrr sett landsstýrismanninum í samferðslumálum spurningar hesum viðvíkjandi í bløðunum, men fekk ta ferðina einki svar. Eg fari tí at royna aftur við hesum spurningunum:

1. Hvør var orsøkin til, at Teistin var so leingi úr sigling í summar, og hvør er orsøkin til, at skipið aftur nú varð tikið úr sigling ?
2. Eru tey teknisku brekini við Teistanum av slíkum slag, at sandoyingar og aðrir brúkarar av rutuni eisini í framtíðini skulu rokna við einum óálítandi ferðasambandi?

Nikolaos og Stamen

TÍÐINDASKRIV
frá Norðurlandahúsinum

Onnur konsertin í Orfeus røðini verður í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 30. oktober. Tá fara Nikolaos Kapnas og Stamen Stantchev á pallin við tónleiki fyri violin og klaver, sum er skrivaður í Fraklandi.

Nikolaos og Stamen hava áður spælt í Orfeus konsertrøðini, og hesaferð verður tað við verkum eftir Debussy, Stravinsky og Saint-Saens.

Sjálv konsertin verður klokkan 20:00. Eins og til fyrstu Orfeus konsertina, verður skipað fyri umrøðu av framførda tónleikinum hálvan tíma undan konsertini, tað er klokkan 19:30

Føroysk lesandi um allan knøttin

TÍÐINDASKRIV
Frá Altjóða Skrivstovuni

Fleiri enn 70 føroyingar lesa nú hægri lestur uttan fyri Norðurlond

Í løtuni eru í minsta lagið 73 føroyingar, sum lesa hægri lestur uttan fyri Norðanlond. Hetta vísa seinastu tølini frá Stuðulsstovninum, sum umsitur ÚSUN skipanina (ÚtbúgvingarStuðul til lesandi Uttan fyri Norðurlond.)

Stuðulin til skúlapengar - Tuition Fees - er upp til 120.000 kr. um árið í normeraðu lestrartíðini plus eitt ár. Hetta verður latið til útbúgvingar sum SU-styrelsen í Danmark góðkennir. Umframt stuðulin til skúlapengar fæst SU-stuðul - Statens Uddannelsesstøtte - sum er uml. 4.000 kr. um mánaðin til vanligar útreiðslur, sum td. mat, íbúð og annað

Stuðulin til skúlapengar - Tuition Fees - er fyri einum góðum ári síðani hækkað t il 120.000 krónur. Hetta sær út til at hava hjálpt, tí heystið 2002 fingu 25 nýggir studentar stuðul eftir ÚSUN kunngerðini, men í ár eru 38 nýggir studentar, sum eru komnir inn í ÚSUN skipanina. Nú eru tilsamans 73 studentar, sum fáa stuðul eftir ÚSUN skipanini.

Fleiri nýggj lond

Stóra Bretland er tað landið har flestu føroyingar nema sær útbúgving, tá ið Føroyar og Danmark ikki eru tald við. Í løtuni eru 55 studentar í Stóra Bretlandi, 20 teirra lesa í Skotlandi og 12 teirra í Aberdeen, býurin er sostatt tann størsti føroyski lestrarbýurin uttanfyri Norðurlond. Í Onglandi eru 29 lesandi, Wales 4 og Norðurírlandi 1 lesandi.

USA er næststørsta landið, tá id umræður føroysk lesandi uttanfyri Norðanlond, í løtuni fáa 7 føroyingar, sum lesa í USA stuðul eftir ÚSUN skipanini.

Umframt Stóra Bretland og USA eru 9 lond á listanum hjá ÚSUN, tey eru: Kanada, Kuba, Ný Sæland, Kina, Avstralia, Spania, Niðurlond, Peru, Italia. Fýra lond eru nýggj, tey eru: Kuba, Ný Sæland, Kina og Spania.

Tað er undrunarvert at Týskland ikki longur er á listanum. Einstakir føroyingar hava verið í Týsklandi og lisið hægri lestur, men í løtuni er eingin hóast tað mangla fólk við kunnleika í týskum.

Nógvar greinir umboðaðar

At føroysk ung fólk lesa nógv ymiskt fak sæst eisini aftur á listanum hjá ÚSUN. Bólkurin list og tónleikur hevur 10 lesandi, bólkurin mál og miðlar hevur 7 lesandi, bólkarnir búskaparfrøði, søga, lívfrøði og vanligar náttúrufrøðiligar lærugreinir hava 5 lesandi hvør, meðan tað eru 4 ella færri í bólkum sum ferðavinnu, heimspeki, marketing, sosiology, landafrøðiligar lærugreinir, MBA, flogskipari, løgfrøði, gudfrøði og sálarfrøði.